# Ætla at leggja fyri flaggdagin

**Á árliga eftirmetingarfundinum við fótbóltsfeløgini fer FSF at leggja fram, at landskappingin næsta ár ikki skal verða so samankroyst undan summarsteðginum, sum hon var tað í ár**



*Karl Vidtfeldt er kappingarstjóri hjá FSF, og lagt er upp til, at feløgini leygardagin fara at umrøða møguligar broytingar í fótbóltskappingini*

FÓTBÓLTSPOLITIKKUR

*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Fyrrapartin í dag, klokkan tíggju, hevur FSF stevnt umboðum fyri fótbóltsfeløgunum til fundar. Talan er um árliga eftirmetingarfundin, sum nógvu tey seinastu árini hevur verið hesa ársins tíðina. Í ár verður fundurin í nýggju FSF húsunum, har fitt av fundarvirksemi og skeiðvirksemi hevur verið, síðani húsini vórðu tikin í nýtslu mikudagin 20. august.

Karl Vidtfeldt, formaður í kappingarnevndini og kappingarstjóri í vaksnamannadeildunum á mannfólkasíðuni, sigur, at bara eitt mál er komið frá feløgunum til fundin. Tað er B71, sum vil hava fundin at viðgera spurningin um flyting millum feløgini. Á hesum fundinum verður eingin avgerð tikin. FSF og feløgini hava møguleika at leggja síni sjónarmið fram og lodda dýpið, um tað er undirtøka fyri broytingum. Um tað er soleiðis, so verður uppskot um broyting lagt fyri aðalfundin, sum plagar at vera seinnapartin av februrar.

FSF ætlar at tosa við feløgini um møguligar broytingar í kappingini og um møguligar nýggjar venjingar og venjaraútbúgvingar.

– Vit fylgja við í tí, sum rørir seg rundanum okkum. Seinastu árini hevur tað verið greitt, at venjaraútbúgvingarnar fóru at verða broyttar. Næsta ár fara grundskeiðini frá A og til E, sum hava verið tað fyrsta, sum nýggir venjarar hava farið undir, at fella burtur, veit Karl Vidtfeldt at siga. Hvussu venjingarútbúgvingin fer at verða skipað í framtíðini fer at verða meiri at frætta um frá útbúgvingarnevndini.

### Hvørt fyri seg

Í ár var fyrsta umfarið í landskappingini á skránni mitt í mai. Síðani varð spælt til 9. juli, tá ið 10. umfarið var á skránni. Fyrsta vikuskiftið í august var 11. umfarið á skránni, og so varð spælt inntil fyrsta vikuskiftið í oktober. Fram ímóti summarsteðginum varð spælt mitt í viku tvær ferðir á rað.

– Okkara útspælt til feløgini er, at tað næsta ár verður farið undir landskappingina síðsta vikuskiftið í apríl. Flaggdagurin, 25. apríl, verður sunnudag, og tá halda vit, at tað hevði verið hóskandi at farið undir landskappingina. Men nú fáa vit at síggja, hvat feløgini halda. Tað er eitt nú fyri at fáa sjónarmiðini á borðið, áðrenn endaligu ætlanirnar verða lagdar.

Í FSF hava teir hugsað sær, at umførini í landskappingini næsta ár skulu vera á skránni í vikuskiftunum, og at tað ikki skal verða spælt mitt í viku.

– Tað hevur verið tosað eitt sindur um broytingar í steypakappingini. Hvussu tað verður við hesum, er eitt sindur ilt at siga undan fundinum. Okkara hugsan er, at bólkaspælið skal verða liðugt, áðrenn tað verður farið undir landskappingina, og at fjórðingsfinalan og hálvfinalan kanska skulu spælast mitt í viku, meðan tað verður spælt í landskappingini vikuskiftini hvørju megin við.

Lagt er upp til, at hvørt felagið skal senda trý umboð á fundin í dag, og at tað eru teir og tey, sum hava ábyrgd í feløgunum, sum fara at tosa um framtíðina við umboð fyri onnur feløg og við FSF umboð.

## Neistin fyri tørni

Kanningarnar hjá løgregluni í samband við málið um útlendsku hondbóltsleikararnar heldur fram. Eftir at løgreglan mikukvøldið hevði verið í Klaksvík, var túrurin komin til Neistan hóskvøldið.

Sum skilst, so vóru útlendsku leikararnir hjá felagnum saman við leiðsluni kallaðir inn á politistøðina í Havn, har pass, arbeiðsloyvi og onnur viðkomandi skjøl vórðu eftirhugd.

Hvat niðurstøðan verður í hesum, er so ikki greitt enn, men sum vit skrivaðu í blaðnum í gjár, so væntaðu tey í Neistanum ikki, at hetta fór at geva nakrar truppulleikar.

**-jm**

# Nú er feilurin funnin

**Todi Jónsson gevur enn eina ferð ilt av sær, at tað skuldi ganga so long tíð, áðrenn FCK syrgdi fyri, at hann slapp framat hjá serlæknanum, sum var førur fyri at finna út av, hvar føroyski FCK spælarin er skaddur**

SKADDUR ÚTISETI

*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

So er tað staðfest. Skaðin, sum knappar tveir teir seinastu mánaðirnar hevur hildið Toda Jónsson burtur frá fótbólti, situr í kokubeininum. Á heimasíðu síni, todi.fo, veit Todi at siga, at eftir at hann fyrr í vikuni var skannaður, staðfesti serlæknin, at talan er um skaða í kokubeininum.

– Tað er eitt liðband í sambandi við symfysuna ella kokubeinið, sum tað eitur á føroyskum, sum er toygnað. Toyggingin kennist á sama hátt, sum tá ið tað er eitt liðband í knænum ella fótinum, sum tað hevði verið galið við. Eg veit ikki, hvussu long tí fer at ganga, áðrenn tað fer at bera til hjá mær at spæla aftur, men nú er einki annað at gera enn at venja og so vóna tað besta. Teir siga, at tað kanska verður ein vika, og kanska verður tað ein mánaði, sigur Todi Jónsson.

### Er sera hamur

Todi Jónsson dylur ikki, at hann er argur um, at tað ikki fyrrenn nú hevur borið til at fáa staðfest, hvør orsøkin til skaðan og pínuna hevur verið:

– Eg havi fyrr sagt, at eg ikki haldi, at tað hevur verið gjørt nóg nógv fyri at finna fram til pínuorsøkina. Tað haldi eg framvegis, og tað kann ikki vera ilt at skilja, at eg iðri meg miriliga um, at tað ikki fyri einum mánað síðani ella meiri enn so bar til hjá mær at sleppa framat hjá serfrøðinginum, sum nú hevur lokaliserað skaðan. Eg havi vant við pínu, uttan at vita um venjingin fór at hjálpa. Tað hevur ikki verið stuttligt. Nú veit eg, at venjingin er tann rætta, og at hon fer at hjálpa. Tað er motiverandi, og eg fari at leggja alt í miðvísa venjing, sigur Todi Jónsson, sum leggur afturat, at fleiri hava spurt, um talan er um sama lyskuskaða, sum í fyrraárið og í fjør helt honum burtur frá liðnum í fleiri mánaðir. Tað er tað ikki, sigur Todi.

Í hesum vikuskiftinum verður tað ikki spælt í Danmark. Tað kemst av, at danska landsliðið sunnudagin fer at spæla vinardyst ímóti Onglandi. Dysturin verður spældur í Manchester. Næstbesta deildin í Danmark er farin í vetrarfrí, meðan tað í bestu deildini fer at verða spælt fram til 9. desember.



# Danska liðkappingin av bakkastokki

**15. og 16. november verða fyrstu tvey umførini í donsku 1. deild telvað. Í hesu aðru upptaktsgrein verður sagt frá vónum føroyinga í donsku elituni undan vikuskiftið. Eisini verður í hesi og komandi greinum ein lýsing av hvørjum einstaka á føroyska liðnum**

UPPTAKT

*Talvfelagið Føroyar í Keypmannahavn*

Talvfelagið Føroyar í Keypmannahavn, sum er talvfelag føroyskra útiseta, bleiv stovnað 14. september 1984. Felagið hevur líka síðan stovnanina luttikið í donsku liðkappingini. Fyrstu tíggju árini vann felagið seg longur og longur upp í lokalu seriunum, fyri síðani í 1995 at rykkja upp í donsku 3. deild. Í triðju deild eru fimm bólkar við átta liðum í hvørjum bólki. Árini 1995-2003 hevur felagið havt lið í triðju og aðru deild, sum hevur tveir bólkar við átta liðum.

Seinasta kappingarár eydnaðist endiliga at røkka ovastu rók innan danska liðtelving, tá ið felagið rykti upp í donsku 1. deild, har bert átta feløg eru umboðað.

### Fyrsta umfar

Leygardagin 15. november skal TF-Føroyar (Talvfelagið Føroyar) telva móti Nørresundby. Nørresundby vann eins og TF-Føroyar sín bólk í 2.deild í fjør, 2. deild øst, og vann sær tískil sæti í fremstu deildini. Nørresundby er eitt siðvant og ársgamalt felag - stovnað í 1934 - sum fleiri ferðir hevur leikað á ovastu rók. Royndirnar hava tó ikki verið av teimum bestu, tí seinastu árini hava teir úr Nørresundby bert klárað at hildið sær í bestu deildini eittans ár, áðrenn leiðin er farin í 2.deild aftur. Teir kunnu í veruleikanum rópast eitt elevator-lið.

Líkindi eru fyri, at teir møguliga mugu somu leið aftur hesu ferð, tí Nørresundby er nevniliga styrkismett sum veikasta liðið í deildini í ár. Nørresundby verður væntandi mannað, sum sæst á talvuni niðanfyri.

Teir eru her settir upp móti føroysku manningini og sum tað sæst á talvuni, eru góð útlit hjá TF-Føroyum at vinna henda dyst. Væntaða úrtøkan er 4,6 stig móti 3,4. Hesi tøl hevur hagfrøðingurin og liðskiparin á liðnum Regin Reinert roknað seg fram til eftir eini hagfrøðisligari skipan, sum Arpad Elo útleiddi miðskeiðis í 20. øld. Hesa skipan rópa telvarar eloskipanina.

| | Føroyar | ELO | Nørresundby | ELO | Væntað | | úrslit |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Einar Gausel | 2525 | Per Næsby Andreasen | 2284 | 0,80 | - | 0,20 |
| 2 | Nikolaj Borge | 2408 | Eric Bentzen | 2372 | 0,55 | - | 0,45 |
| 3 | John Arni Nilssen | 2426 | Tommy Nielsen | 2223 | 0,76 | - | 0,24 |
| 4 | Flóvin Tór Næs | 2337 | Svend Pedersen | 2275 | 0,58 | - | 0,42 |
| 5 | Heini Olsen | 2264 | Bent Sørensen | 2287 | 0,47 | - | 0,53 |
| 6 | Eyðun Nolsøe | 2227 | Jørgen Jørgensen | 2266 | 0,45 | - | 0,55 |
| 7 | Carl Eli N. Samuelsen | 2194 | John Bauneborg Nielsen | 2201 | 0,49 | - | 0,51 |
| 8 | Heini Danielsen | 2165 | Niels Henrik Willumsen | 2164 | 0,50 | - | 0,50 |
| | Miðal | 2318 | | 2259 | 4,60 | - | 3,40 |

Væntað_ manning í fyrsta umfari

### 2. umfar móti SK68

Leygardagin 16. november stendur SK68 úr Århus fyri skotum. SK68 hevur 35 ár á baki, og telvaði í 1.deild fyrstu fer í 1980. Síðani hevur gongdin verið eitt sindur up og niður millum 1. og 2. deild. Seinastu trý árini hava teir tó verið fastir fúsir í ovastu deildini og besta úrslitið hjá teimum varð eitt triðja pláss í 2001. Seinasta kappingarár gjørdust teir nr. 5.

SK68 er sambært eloskipanini styrkismett sum næstveikasta liðið í deildini. Útlit eru tí fyri, at teir kunnu fáa eitt hart kappingarár, men manningin hevur nógvar royndir á ovastu rók, so lættir verða teir helst ikki at syfta.

SK68 verður væntandi mannað sum tað sæst á talvuni niðanfyri. Teir hava nevnliga havt somu støðugu manning seinastu mongu árini. Góð útlit er hjá TF-Føroyum at vinna henda dyst. Væntaða úrtøkan er 4,49 stig móti 3,51, sum tað sæst á talvuni.

Eitt er framanundan væntað úrslit, eitt annað er at fáa stigini til høldar. Vónandi klárar føroyska liðið seg eins væl ella betur sum metingin og tølini hesir fyrstu tveir dystir vísa á. Ein skal eisini hava í huga, at oftani er tað ein torfør uppgáva at klára seg væl fyrsta árið sum uppflytari. Telvararnir skula venja seg við sterkari mótstøðu, nýtt umhvørvið, og tað kann taka sindur av tíð, men vónandi ikki ov langa tíð hjá føroyska felagnum.

### Eftir dystirnar

Um alt gongur sum tølini vísa, vil TF-Føroyar væntandi vera á triðja plássi eftir fyrstu tvey umførini í kappingini. Væntaðu tølini siga, at Helsinge tá hevur lagt seg á odda framman fyri Skolerne úr Aarhus og TF-Føroyar.

Tí eru góð líkindi fyri, at dysturin hjá TF-Føroyum tann 7. desembur í triðja umfari móti donsku meistarunum seinastu trý árini úr Helsinge, verður oddadystur í 1. deild!

### Vangamynd av manningini hjá TF-Føroyum

Í hvørjari av upptaktsgreinunum er ætlanin at lýsa onkrar av monnunum á liðnum hjá TF-Føroyum. Hesa ferð verða tveir fyrrverandi føroyameistarar lýstir. Teir eru Flóvin Tór Næs og Eyðun Nolsøe.

### Flóvin Tór Næs:

Flóvin er føddur 6.juni 1978 og vaks upp fyrstu árini í Íslandi. Í 1985 vísti hann seg fyrstu ferð í hølum Havnar Telvingarfelags bert sjey ára gamal. Skjótt sást, at her var ein drongur við serligum dygdum á teimum 64 puntunum.

Nógv FM-heitið hevur Flóvin vunnið sum smádrongur og unglingi. Hann hevur verið fastur maður í landsliðbólkinum síðani 1994, og í ár 2000 gjørdist hann føroyameistari, tá hann vann í umdysti á John Rødgaard og Torbjørn Thomsen.

Við hesum endaði framgongdin tó ikki. Í juli 2002 vann Flóvin sær, sum fyrsti føroyingur, sín fyrsta IM-norm. Hetta er ein partur av tí, sum krevst fyri at fáa heitið altjóða meistari.

Flóvin hevur umboðað Føroyar á tveimum Talvolympiadum, í 1998 og 2000.

Flóvin er eyðmerktur sum ein ástøðisliga sterkur og positionellur telvari. Hann er væl fyrireikaður. Flóvin er somuleiðis kendur sum ein treiskur telvari, ið altíð berjist fyri at fáa sum mest burturúr øllum talvum. Ein sannur stríðsmaður, serliga tá illa stendur til. Hetta hava nógvir sterkir telvarar merkt.

Flóvin telvaði burturav í eitt ár, 1999-2000. Nú er hann í lestrarørindum í Keypmannahavn, og gevur tað honum góðar møguleikar at luttaka í nógvum kappingum í Danmark og harvið mennast sum telvari.



*Umframt at vera ein av sterkastu føroysku telvarunum, er Eyðun Nolsøe eisini kendur sum tónleikari*

| | SK68 | ELO | Føroyar | ELO | Væntað | | úrslit |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Allan Holst | 2347 | Einar Gausel | 2525 | 0,27 | - | 0,73 |
| 2 | Arne Matthiesen | 2312 | Nikolaj Borge | 2408 | 0,37 | - | 0,63 |
| 3 | Magnus Lindfeldt | 2252 | John Arni Nilssen | 2426 | 0,27 | - | 0,73 |
| 4 | Lars Hansen | 2242 | Flóvin Tór Næs | 2337 | 0,37 | - | 0,63 |
| 5 | Erik Søbjerg | 2259 | Heini Olsen | 2264 | 0,49 | - | 0,51 |
| 6 | Pelle Rødkjær Bank | 2249 | Eyðun Nolsøe | 2227 | 0,53 | - | 0,47 |
| 7 | Martin Matthiesen | 2272 | Carl Eli N. Samuelsen | 2194 | 0,61 | - | 0,39 |
| 8 | Thomas K. Christensen | 2235 | Heini Danielsen | 2165 | 0,60 | - | 0,40 |
| | Miðal | 2271 | | 2318 | 3,51 | - | 4,49 |

Væntað_ manning í øðrum umfari

### Eyðun Nolsøe

Eyðun er føddur 11. august 1966 og uppvaksin í Klaksvík. Eyðun er í Føroyum eisini kendur sum tónleikari í Frændum, har eisini tveir aðrir sterkir telvarar mynda bólkin. Eyðun hevur altíð telvað, men var fyrstu árini ikki roknaður millum stóru talentini. Hann hevur tó stillisliga og áhaldandi arbeitt seg miðvíst fram sum ein av sterkastu telvarum í Føroyum.

Í nógv ár hevur Eyðun verið fastur maður í landsliðsbólkinum. Í 1995 gjørdist Eyðun føroyameistari og hevur hann umboðað Føroyar á trimum Olympiadum, í 1996, 2000 og 2002.

Eyðun er eyðkendur sum ein taktiskur og kombinatoriskur telvari. Eyðun er væl fyrireikaður uppá byrjanartalvið, er ástøðisliga væl fyri, og er ein energiskur telvari. Við svørtum gongur ikki altíð eins væl, men við hvíta fólkinum hevur Eyðun nógv góð úrslit, harav sigrar á stórmeistarum.

Eyðun er búsitandi í Keypmannahavn, og hevur hann havt góðar møguleikar at styrkja telvingina í danska talvlívunum, eins og hann hevur verið føroyska talvfelagnum í Keypmannahavn ein hollur stuðul seinastu mongu árini.